VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Fólkavald kommuna í 100 ár

Í dag eru 100 ár liðin, síðan havnarfólk á fyrsta sinni valdu fólk í Tórshavnar býráð at stýra býnum, og hetta fer at merkja høvuðsstaðin komandi árið.

Nógv er broytt í Havnini hesi hundrað árini. Gamla Havnin var úti á Reyni, niðri í Gongini og kring Vestaruvág. Býarmenningin gjørdi, at býurin vaks norðureftir, niðan eftir Tinghúsvegnum og vestureftir framvið Eystaruvág.

Havnarfólk eru so heppin, at stórur partur av býarsøguni er savnað og skrivað í "Havnar Søgu", sum Jens Pauli A. Nolsøe og Kári Jespersen hava skrivað. Tvey bind eru higartil komin út, og fevna tey um tíðarskeiðið fram til amtstíðina í 1816. Framhald av býarsøguni kemur í næstum.

Nógv er annars skrivað um Havnina, eitt nú skrivaði William Heinesen, mata skald okkara og heiðursborgari í Havn, bókina "Tann deiliga Havn" – heitið, sum gjørdist slagorðið, sum býurin tók til sín. Har hugleiðir William m. a. um gamla býarpartin, har hann varð føddur og vaks upp:

"Bringsnargøta var sum áður sagt ein av høvuðsgøtunum í býnum, men í so máta kundi hon tó ikki metast javnt við Gongina. Mangan droymi eg enn, at eg fjakki har, og at henda tronga og langa gøtan aftur er mær ógreið og gátuført óendalig, soleiðis sum hon tóktist mær at vera, fyrsta eg minnist. Eg gangi meg móðan og missi meg sjálvan burtur í hesum villingarsama krønglinum. Her er líkt sum í Singapore ella Hongkong ella onkum øðrum fjarløgdum og royktámutum, gomlum, hálvvillum stórbýi. Gjøgnum gluggar og opnar dyr sært tú inn í roykstovur og náttljósar krambúðir. Vertshúsið, ella Hotel Djurhuus, sum var hitt fínara heitið, dagar høgt upp móti dimmari luft, stórt og marghátttliga samanbygt sum eitt asiatiskt kloystur. Á báðar hendur eru skýmligar tvørgøtur við brúgvum ella trappum. Upp móti himni hevjar seg Nólsoyarstova sum ein veneziansk glæstriborg…"

Um tað mundið og tíðina eftir 1909 sæst býarplanlegging seta dám á Havnina. Tað sást longu, tá Tinghúsvegurin varð bygdur seinast í 19. øld, men eitt nú Bøgøta, Sverrisgøta, Tróndargøta, Magnus Heinasonargøta og Rabarbukvarterið eru talandi dømi um hepna planlegging. Mads Andreas Winther, sum tók við sum borgarstjóri 1. januar í 1909 mundi valla ímynda sær tann framburð og vøkstur, sum býnum hevur verið fyri síðani tá.

Borgarstjórin á 100 ára degnum, Heðin Mortensen, kann saktans vera stoltur av býnum, eins og allir aðrir havnarborgarar. Tá Heðin Mortensen varð valdur í býráðið á fyrsta sinni, var kommunan ikki komin til pensjónsaldur, og nú stendur hann við stýrisvøl sum best umtókti borgarstjóri nakrantíð.

Vit ynskja øllum havnarborgarum hjartaliga tillukku við degnum í dag!

Sosialurin

Mamman - umhugsan, ábyrgd og árin

DÁVID ISFELD

Fosturtøka (2. partur)

Sum eg segði í 1. parti av greinarøðini, sum er í trimum pørtum, skuldi fyrsti partur snúgva seg um barnið; meðan hesin parturin fer at snúgva seg um kvinnuna, sum er við barn. Tað eru nógvir spurningar, gerðir og árin ein kvinna við barn eigur at umhugsa, áðrenn hon skal taka avgerð um fosturtøku.

Orsøk til fosturtøku

Orsøkirnar til ynski um fosturtøku eru vanliga hesar: sjálv orsøkin til, at kvinnan bleiv við barn og tilhoyrandi trupulleikar av at fáa og hava eitt lítið barn. Tá eg sigi sjálv orsøkin til, so meini eg umstøðurnar, tá ið barnið bleiv til; t.d. tað kann hava verið orsaka einari eingangs samveru, har einki forhold er millum mammu og pápa og tískil als einki ynski um eitt barn, ella ringt forhold har tey eru farin hvør til sítt eftir staðfesting av graviditeti, ella tá talan er um neyðtøku, ella tað, sum verri er: neyðtøka, sum er framd av nærmastu familju.

Talan kann eisini vera um trýst frá familjuni, ella trýst frá pápanum at barninum, um at fremja fosturtøku.

Hin orsøkin til ynski um fosturtøku, er ofta truplu umstøðurnar hjá mammuni (saman við pápanum í summum førum). Trupla støðan er vanliga tað umhvørvið, sum barnið skal liva og mennast í, eitt nú trong livikor - íbúðarliga og peningaliga - ella misnýtsla av rúsevnum, sálarligur veikleiki/sjúka, likamlig sjúka/brek o.t.

Omanfyri havi eg júst nevnt nakrar ítøkiligar trupuleikar viðvíkjandi óhepnum umhvørvi og sálarligum ella likamligum vansum; men hvat er tað ítøkiligt, sum kvinnan heldur vera ein trupul og vónleys støða við at fáa eitt barn í lívið hjá sær, sum ikki hevur omanfyrinevndu truplu umstøður? Jú, barnið ger tað truplari at fáa sær útbúgving; kvinnan missur sítt frælsi til at koma og fara, sum henni lystir; og um hon hevur arbeiði, forðar barnið henni møguliga í at náða síni mál í sínum arbeiði. Um hon ikki hevur ein fastan maka, er barnið eisini eitt haft um beinini hjá hesi "single"-kvinnuni. Hjá hesi kvinnuni hevur barnið sostatt bert broytingar við sær, sum ikki passa inn í tað lívið, sum kvinnan hevur livað, áðrenn hon gjørdist við barn. Barnið kemur ikki inn í eitt ótrygt umhvørvi, men tað verður mett at verða til ampa, verða ólagaligt, treytaleys ábyrgd fyri barninum 24 tímar um samdøgrið fylgir við, tað tekur frælsið frá kvinnuni, og at enda hava ikki allar kvinnur kensluligt yvirskot til eitt barn. (Hetta er upplýsing og meiningar, sum eg havi fingið við at práta við ymiskar kvinnur; eisini havi eg fingið upplýsing úr bløðum og dokumentar sendingum - tískil eftirfarandi, hóast generelt).

Hvar er pápin?

Av tí at eg viðgeri tað vanliga - tað generella - er fokus á kvinnuna; tí tá talan er um fosturtøku, er tað aloftast hennara ynski, sum vigar mest. Hetta er sjálvsagt, av tí at tað er hon, sum ber barnið. Men - og hetta er eitt stórt men - menn/pápar hava líka stóra skuld í og ábyrgd av hesum barni, og líkist tað tískil ongum, at pápin ofta vaskar sínar hendur viðvíkjandi avgerðini um fosturtøku. Hann lastar mammuna við endaligu og tungu avgerðini um fosturtøku og soleiðis eisini ábyrgdina av hesum, og møgulig árin sum sorg, samvitskubit o.s.fr., og ger sostatt seg sjálvan stórt sæð frían fyri alla ábyrgd, samvitskubit og ivamál. Pápin eigur at vera við í avgerðini um fosturtøku, uttan so, at umstøðurnar eru heilt serstakar - undantøk eru altíð; tað ber illa til at taka hædd fyri undantøkum í eini heildarviðgerð. Tá tvey vaksin fólk hava gjørt eitt barn, er avgerð um framtíð barnsins - um nøkur - líka so nógv ein felags avgerð, sum barnið er eitt felags avkom.

Til kvinnuna - ynski og árin

Kvinnur, sum ikki ynskja tað barn, tær ganga við, umhugsa ofta fosturtøku; men í kjalarvørrinum á hesum valmøguleika fylgja nógv ivamál og nógvir spurningar við - bæði etiskir og praktiskir.

Hjá kvinnuni, ið hevur ringar forteytir til at geva barninum góða og trygga uppaling, verður kanska nógv hugsað um barnið; t.d. hvørji sannlíkindi eru fyri, at barnið fer at trívast og mennast - fær tað ein tryggan og góðan barndóm og eitt eydnuríkt lív o. s.fr. Meðan hjá kvinnuni, ið hevur tað gott og livir í góðum korum, hugsar hon kanska meira um seg sjálva - hennara lív og hennara framtíð.

Tað er bara tað, at tað eru nakrir spurningar, ið tíverri ikki kunnu svarast áðrenn fosturtøkuna, t.d.: hvussu fer kvinnan at hava tað sálarliga eftir fosturtøkuna? Onkur kvinna fer at spyrja seg sjálva ræðuligar spurningar eftir fosturtøkuna sum t.d.: gjørdi eg hetta fyri barnið ella meg sjálva? Var tað bara ein fosturklumpur ella var tað eitt barn, ein menniskja, ið varð burturbeint? Drap eg mítt egna barn? Kann eg nú nakrantíð verða ein góð mamma? Og eitt sindur meira praktiskt: Fer eitt barn, sum eg ynski mær, at eydnast, ella fer áður framda fosturtøkan at orsaka eina óynskta fosturtøku? Og tann trúgvandi: Hvat heldur Gud um mína gerð? Verið eg revsa fyri hetta? Hvussu kann eg koma upp í Guds ríki nú?

Tað eru óivað nøkur, sum halda, at hetta er ósakligt og melodramatiskt; men við at kanna hetta nærri, finnur tú ein syndarligan veruleika, sum fólk ikki tosa um, tí tað er eitt eymt evni og avvarandi fólk eru ov hørm, til opið at tosa um hetta.

Veruleikin er tann, at tað kann verða trupult at fáa eitt barn eftir framda fosturtøku, tí at fostrið nú ikki megnar at seta seg fast í lívmóðirina, og tí bløðir mamman fostrið út - ferð aftan á ferð. Um kvinnan, sum ynskir fosturtøku, fær hesa upplýsing frá læknanum í viðtaluni, veit eg ikki, men tað átti læknin at sagt kvinnuni (eg veit um hendan trupuleika frá einum sjúkrarøktarfrøðingi). Flestar kvinnur ynskja sær hóast alt børn fyrr ella seinni.

Eg veit, at hetta síðsta petti av greinini var beiskt at lesa og er ilt at sodna, men nøkur evni eru bara soleiðis, um tað skal tosast reiðiligt og við skili um tað. Hetta er, hóast ótespuligt í løtum, skrivað til frama fyri kvinnur, sum ivast í, hvussu tær skulu fyrihalda seg til fosturtøku. (Onkur spyr helst hvat eg, ein maður, veit um tað at vera við barn - og kanska eitt barn, ein ikki ynskir. Tað veit eg heldur ikki - hóast pápi at fimm børnum - men eg havi kær fólk, sum hava ynskta og/ella óynskta fosturtøku í teirra lívsins viðføri, og í báðum førum er teirra byrða tung). Hetta er sjálvsagt eingin frymil fyri hvussu ein skal gera. Hetta eru tankar og onkrir sannleikar um, hvat fosturtøka kann innibera, og hvørji árin fosturtøka kann hava fyri kvinnuna - og mannin í summum førum. Ábyrgdarfullir, fyrilitarligir og umhugsnir menn kenna sanniliga eisini kensluligu árinini av fosturtøku. Og teir menn, sum vanliga biða seg undan hesi ábyrgd, áttu at lisið hetta og tikið hetta til eftirtektar, tí eg meini ikki, at slíkar avgerðir skulu gerast lættliga. Hetta er tó bert ein íblástur til støðutakan.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Redaktiónsleiðari: Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.